

*Føroyar, Grønland og Ísland skrivaðu hósmorgunin undir eina nýggja samstarvsavtalu á mentanarøkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Endurnýggjað mentanaravtaluna

**Føroyar, Grønland og Ísland hava endurnýggjað samstarvsavtaluna millum londini á mentanarøkinum. Hósmorgunin undirskrivaðu partarnir avtaluna á nýggju og stásiligu Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn**

MENTANARSAMSTARV
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hósmorgunin undirskrivaðu Føroyar enn eina samstarvsavtalu á mentanarøkinum. Herfyri kom ein mentanaravtala í lag við Hetland, og hósmorgunin varð ein líknandi samstarvsavtala undirskrivað við Grønland og Ísland. Avtalan varð undirskrivað á nýggju og stásiligu Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn.

Tað eru mentamálaráðharrarnir í Útnorðurlondunum sum standa fyri samstarvsavtaluni. Føroyar, Ísland og Grønland hava síðan tíðliga í nítiárunum havt eitt skipað mentanarsamstarv, og nýggja avtalan millum londini er eitt framhald av gomlu avtaluni. Avtalan er galdandi í trý ár, og kemur í gildið 1. januar 2004

## Økja samstarvið

Endamálið við samstarvsavtaluni er at økja samstarvið í Útnorði á mentanarøkinum. Avtala er eisini um at samstarva innan ítrótt, sjálvboðið barna- og ungdómsvirksemi, umframt á undirvísingar- og granskingarøkinum.

Londini eru á einum máli um, at nøkur økið skulu komandi trý árini raðfestast hægri enn onnur. Í 2004 fara Føroyar, Ísland og Grønland verður økið "sjálvboðið barna- og ungdómsarbeiði raðfest fremst. Í 2005 eru tað bókmentir, og í 2006 verður tað søgan hjá Útnorði, sum verður hægsta raðfesting.

Landsins besta bilaleiga



Ring: flogvøllurin 212 765 ella Tórshavn 217 535
Johs. Berg · Staravegur 1 · 100 Tórshavn
AVIS We try harder

Móttøka
Í sambandi við 25 ára starvsdag
Í sambandi við at Pætur Joensen, býarverkfrøðingur tann 1. desember 2003 hevur verið í starvi hjá Fuglafjarðar kommunu í 25 ár, so verður skipað fyri almennari móttøku í býráðshúsinum mánadagin 1. desember 2003 millum kl. 15.00-18.00
Fuglafjarðar býráð



Hestprent gevur pappírinum betri flog
HESTPRENT – tí pappír hevur uppiborið tað besta



# Kreppufundur í SvF

**Flaggskipið hjá Sjónvarpi Føroya er í havsneyð, tí Degi og viku tørvar manning. Á kreppufundi mikudagin fingu starvsfólkini á tíðindadeildini lyfti frá leiðsluni um, at fleiri fólk vera sett til tíðindadeildina, so støðið verður hækkað og fólkini trívast betur**



*Tvey kend andlit á SvF. Katrin Petersen er aftur í sjónvarpinum. Hon er virkandi tíðindaleiðari, eftir at Grækaris D. Magnussen legði frá sær. John Johannessen er bæði tíðindafólk og redaktørur á Degi og viku.*

DAGUR OG VIKA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fokus er tikin av skránni. Ongin Breddi. Grannar okkara avlýstir.

At okkurt er galið í Sjónvarpi Føroya hava fleiri ábendingar verið um í síðstuni. Mikudagin var kreppufundur á Hotel Føroya, har fólk á tíðindadeildini viðgjørdu støðuna saman við leiðsluni. Niðurstøðan var, at tíðindadeildini, sum fyrstu og fremst framleiðir Dag og viku, tørvar fleiri fólk.

## Flaggskip í havsneyð

Tey, sum gera sær ómak hyggja nærri, tá rullitekst-urin rennur eftir skerminum, tá ljósvarparnir eru sloknaðir í Degi og viku, hava óivað varnast, at her mátti endað galið. Oftast hava bara tríggir, onkuntíð tveir journalistar framleitt teir umleið 20 minuttirnar, sum Dagur og vika er. Tað man vera heimsmet í sjónvarpshøpi.

Tað hevur ført til, at fólk eru strongd, misnøgd og hava umhugsað at fara aðrastaðni. Tá ið Sjónvarp Føroya herfyri søkti eftir programmfólki, søkti eingin uttanífrá, frættist. Tað er eitt óvanligt sjúkutekin, tí vanliga er sjónvarp tað, sum allir journalistar tráða eftir at sleppa framat.

Verður hugt eftir tølunum, so sæst, at journalistarnir hava arbeiðsumstøður, sum nærkast tí ótolandi. Sjey journalistar eru í starvi. Hálvur annar fer til ítrótt. Ein er redaktør. Ein er upplesari. Ein hevur Breddan og minst ein hálvur fer til Fokus. Eftir eru tríggir journalistar at framleiða til sjálvt flaggskipið hjá SvF. Og er ein sjúkur ella heima hjá barni, so eru tvey fólk til at seta dagsskránna í Føroyum.

Tað hevur ljóðað, at misnøgd hevur verið við, at stjórin ikki raðfestir tíðindapartin nóg høgt. Men fólk av tíðindadeildini, sum Sosialurin hevur tosað við, halda ikki, at tað er kjarnin í málinum. Heldur er talan um, at hann ikki hevur fatað teirra støðu, og á kreppufundinum fekk hann fleiri sannleikar at vita, hann als einki visti um.

## Minst fimm fólk

Á kreppufundinum, sum var á Hotel Føroyum mikudagin, var støðan viðgjørd. Ætlanin var alla tíðina at hava temafund hendan dagin, tí umfatandi bygnaðarbroytingar standa fyri framman. Men nú støðan var so vónleys, og fleiri journalistar hóttu við at fara, varð teirra støðu burturav viðgjørd.

Serkøn hjálp kom uttanífrá, bólkar vóru settir niður og allir komu til sama úrslit. Semja var um, at minst 5 journalistar umframt myndafólk burturav skulu fáast við at framleiða til hvørja Dag og viku. Fimm søgur krevja fimm fólk, er niðurstøðan, tí sjónvarp er so tíðarkrevjandi.

Soðið er tunt, verður tíðum sagt um Dag og viku, og tað er helst ikki uttan orsøk. Men tað er ikki tí, at journalistarnir ikki tíma. Journalistar skríggja eftir at sleppa at grava eitt sindur djúpri, sigur ein kelda í sjónvarpinum, men tá manningartrotið er so stórt, so fara teir sjálvandi eftir tí trygga, tí pláss er ikki fyri, at okkurt kiksar.

## Fingu lyfti

Sum skilst endaði kreppufundurin á SvF við, at leiðslan gav starvsfólkunum lyfti um, at fleiri fólk vera sett at framleiða tíðindi, og helst skulu minst 5 fólk vera tøk til hvørja sending. Harafturat verður Breddin niðurlagdur, so orkan fer til høvuðssendingina. Broytingarnar koma í gildi beinanvegin.

Ein annar trupulleiki hevur verið útgerðin á sjónvarpinum, sum hevur verið ein forðing fyri framleiðsluni. Nýggj digital útgerð stendur av stovninum, men av tí, at upplæring ikki er fylgd við, stendur hon og samlar dust. Tann parturin skal eisini fáast upp á pláss, hava starvsfólkini á tíðindadeildini fingið lyfti um.

Bókadagur 2003
Bókadagur við bókacafé verður sunnudagin 30. november kl. 15 í Norðurlandahúsinum



Skrá fyri Bókadagin 2003 í Norðurlandahúsinum
**Kl. 15.00:** Bókaframsýningin letur upp
**Kl. 15.15:** Rithøvundafelagið bjóðar vælkomin
**Kl. 15.20:** Bárður Persson lesur egnar yrkingar
**Kl. 15.30:** *Loppugras.* Framløga av nýggju bókini hjá Sólrun Michelsen við myndum eftir Hanna Bjartalíð. Í bókini eru sangir, sum Palli Hansen hevur gjørt løg til. Børn syngja saman við Jóannu Johansen
**Kl. 15.50:** Jóngerð Poulsen lesur egnar yrkingar
**Kl. 16.00:** Hans Jacob Kollslíð lesur egnar yrkingar
**Kl. 16.10:** *Ikki av fiski eina.* Steintór Rasmussen sigur frá yrkingum sínum og lesur úr savninum
**Kl. 16.30:** Steðgur, har høvi verður at tosa við rithøvundar og útgevarar
**Kl. 17.00:** Oddfríður M. Rasmussen lesur úr nýggja savni sínum
**Kl. 17.10:** *Er Gud danskari?* Carl Jóhan Jensen hevur samrøðu við Alexandur Kristiansen
**Kl. 17.30:** Alexandur Kristiansen lesur
**Kl. 17.40:** Bókadagurin endar
NORÐURLANDAHÚSIÐ
Bókasølan Tel. 31 95 75 · www.bokasolan.fo
RITHØVUNDAFELAGIÐ
SANSIR 355 355